## Vilja ikki hava Maradona

Argentinska fótbóltslegendan, Diego Maradona, hevur sagt seg vera til reiðar at traðka til sum argentinskur landsliðsvenjari. Men stendur tað til argentinska fólkið, so verður hetta av ongum. Sambært eini atkvøðugreiðslu, sum blaðið, Clarin, hevur skipað fyri, vilja bert 5,8% av fólkinum hava Diego Maradona sum landsliðsvenjara. 69,5% siga seg peika á annan kandidat, og seinastu 24,7% siga seg ikki vita.



## Málveitsla í Champions League

Ikki færri enn 36 mál vórðu skotin í teimum átta dystunum í Champions League-bólkaspælinum í gjárkvøldini. Flestu málini fullu í dystinum millum Villarreal og AaB, har donsku meistararnir løgdu rygg til 6-3 tap, men eisini aðra staðni vórðu nógv mál skotin. Eitt nú í 5-3 sigrinum hjá Lyon móti Steaua Bucharest og í 5-2 sigrinum hjá Arsenal móti Fenerbache. Í blaðnum í morgin hava vit fullfíggja yvirlit yvir triðja umfarið í Champions League-bólkaspælinum.

HB-B36 3-0 (2-0):

# HB vann dystin um silvurið

*HB*

*B36*

**Havnarfeløgini bæði høvdu silvurkrónurnar at stríðast fyri, tá ið feløgini hittust í Gundadali í gjár. HB vann trygt 3-0 í undirhaldandi dysti, sum fekk eina vend, tá ið B36 fekk ein mann útvístan**



*B36 hevði bóltin nógv. Eisini eftir at teir fingu mann útvístan. Men HB var hvassara liðið, og vunnu teir ein uppibornan 3-0 sigur á grannunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR**
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Hóast flestu eygu vóru vend mótvegis EB/Streymi og teirra møguleika fyri at vinna føroyameistaraheitið, so var eisini ein stórur dystur í høvuðsstaðnum í gjár. HB og B36 stríddust nevniliga fyri at vinna sær silvurheiðursmerkini í Formuladeildini, og nógv fólk vóru uppmøtt fyri at síggja, hvør skuldi vinna slagið um høvuðsstaðin og harvið eisini silvurheiðursmerkini.

Hjá HB var Kári Nielsen ikki tøkur vegna skaða, meðan Odmar Færø hjá B36 var leikbannaður.

### Lív í

Frá fyrsta bríksli var veruligt lív í dystinum, eins og tað skal vera í slíkum uppgerðum. Eingin vildi tapa slagið um høvuðsstaðin, og menn fóru eisini við fullari megi í hvønn einasta nærdyst.

HB hevði yvirvág í spælinum fyrstu løtuna, og tað vóru eisini teir, sum løgdu um. Bara fimm minuttir vóru farnir, tá ið HB setti eitt álop í gongd í høgru síðu. Innlegg kom inn í brotsteigin, haðani ein skotroynd varð latin av, og Meinhard Joensen bjargaði hesari beint út til ein púra leysan Andrew av Fløtum, sum lættliga kundi leggja HB á odda 1-0.

B36 royndi eftir málið at trýsta, og tað eydnaðist eisini í ein ávísan mun. Heilt vandamikið bleiv tað tó ikki, og skotroyndirnar vóru ofta ov langt burturi frá málinum.

### Jákup á Borg útvístur

Tá ið góður hálvur tími var leiktur, hendi mest umtalaða støðan í dystinum. HB hevði sett seg ígjøgnum við nøkrum hørðum takklingum, og eftir eina av hesum høvdu B36-leikararnir fingið nokk. Fleiri teirra flokkaðust rundan um dómaran, Eiler Rasmussen, og Jákup á Borg mundi havt tikið ov rívan til, tí Eiler gav honum reyða kortið fyri at hava sagt eitthvørt.

Hetta gjørdi tað als ikk lættari hjá B36, og HB fekk nú væl meiri pláss at spæla á. Hetta gagnnýttu teir tríggjar minuttir áðrenn hálvleikssteðgin, tá ið tað eydnaðist teimum at økja til 2-0. Páll Mohr Joensen sendi eitt fríspark á málið, sum Meinhard Joensen bjargaði, men á returbóltinum var Fróði Benjaminsen klárur, og skoraði til 2-0 ímóti gomlu liðfeløgum sínum.

2-0 var eisini hálvleiksstøðan.

### B36 omaná

HB kom betur frá byrjan í seinna hálveiki, har teir høvdu nógv pláss at spæla bóltin sínamillum. B36 vann seg tó væl inn aftur í dystin, og eitt skifti í seinna hálvleiki høvdu teir bóltin nógv og løgdu trýst á HB-verjuna. Spælið var gott til tíðir, og í nøkrum støðum vóru teir eisini tætt við at fáa spenning aftur í dystin. Tættastur var Ingi Højsted, sum sendi eitt langskot fáar sentimetrar framvið HB-málinum.

Burtursæð frá hesum hevði HB gott tamarhald á støðuni, og spældi bóltin róliga sínamillum. Hetta drap stóran part av tíðini, men gott eitt korter fyri leiklok økti HB til 3-0. Innskifti Rókur av Fløtum Jespersen sendi innlegg úr høgru, og inni í brotsteiginum kundi ein púra leysur Fróði Benjaminsen økja til 3-0 við væl stýrdum skoti upp undir nettakið.

Eftir hetta fingu liðini hvønn sín stóra málmøguleika. HB var nær við eftir trunkaspæl í B36-brotsteiginum, meðan Hanus Thorleifsson var tætt við at pynta um úrslitið fyri B36, tá ið hann stútaði eitt hornaspark fáar sentimetrar omanfyri málið.

HB dugdi ómetaliga væl at gagnnýta málmøguleikar, og við uppiborna 3-0 sigrinum kunnu teir nú fegnast um silvurið, meðan kappingarneytarnir úr B36 nú mugu gera arbeiðið liðugt fyri at fáa bronsumerkini um hálsin.

## Jákup skilir einki

Jákup á Borg stendur spyrjandi eftir avgerðina hjá dómaranum at vísa hann av vøllinum seinnapartin.

Áskoðararnir í Gundadali vóru allir bilsnir, tá Eiler Rasmussen, dómari, brádliga vísti Jákupi á Borg av vøllinum í grannauppgerðini millum HB og B36 seinnapartin. Helst vóru onkur ljót orð íblandað, men landsliðsleikarin skilir púrt einki av reyða kortinum, og staðfestir, at hann ikki fór um mark.

- Talan var beinleiðis um vandamikið spæl í summum førum, og tað hóvaði mær sjálvsagt ikki. So eg fór róliga til dómaran og segði, at hann noyddist at verja leikararnar. Ja, eg kallaði hann ein klovn, men ikki meira enn tað. Fólk vita, at eg kann øsa meg, men komi á jørðina aftur alt fyri eitt, staðfestir landsliðsleikarin, sum noyðist at sita uttanfyri, tá hvíta havnarfelagið fær vitjan av B68 leygardagin.

- Eg harmist sjálvsagt um støðuna, tí tað fekk stóra ávirkan á dystin. Og av tí sama mistu vit silvurheiðursmerkini. Mín útsøgn var ikki til eitt reytt kort, og hon er lítið av miklum, sum dómararnir í eitt nú Premier League taka á seg hvørt vikuskifti, staðfestir Jákup á Borg.

## Teir skaptu lítið

Fróði Benjaminsen var við tveimum málum stóri sigursharrin hjá HB í gjár. Eitt reytt kort til B36 gjørdi tað ikki verri hjá HB, men hann metir ikki, at teir vóru vandamiklir frammanundan.

- Reyða kortið gjørdi sjálvandi fortreytirnar hjá teimum verri, men teir skaptu ikki nógvar møguleikar áðrenn tað heldur. Teir spældu fram til tað síðsta, men so vóru teir ófarligir, segði Fróði eftir dystin.

- Vit byrjaðu ógviliga væl, og vóru tendraðir, staðfesti hann.

Í HB hevur verið sóknast eftir størri stabiliteti, men í seinni helvt hevur gingist stak væl hjá teimum. Fróði er ikki ónøgdur við 2. plássið.

- Vit kunnu ikki vera annað enn nøgdir. Vit hava verið óstabilir, men tað hevur koyrt væl uppá tað síðsta, segði Fróði, sum helt tað nú vera øðrvísi at spæla ímóti sínum gomlu liðfeløgum, men fegnast um, at hann fekk tvey mál ímóti teimum.

Fróði Benjaminsen, sum hevur sáttmála við HB komandi kappingarár afturat, vil hava størri stabilitet á liðið komandi kappingarár, og annars spæla víðari upp á tað, sum HB hevur víst í seinni hálvu.